# VINNUSÍÐURNAR

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# – Andras Róin ímyndin av leiðslu




*Gloria Kalsø, limur í dómsnevndini, hevði bert rósandi til fyrrverandi oddamannin á Føroya Tele*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Fríggjadagin varð Andras Róin kosin ársins leiðari. Hann bleiv róstur fyri at vera ímyndin av leiðslu og fyri at hava stýrt eini fyritøku, ið vann pening**

VINNA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Á ársins leiðaradegi, sum Synergi skipaði fyri á Hotel Føroyum fríggjadagin, varð Andras Róin, fyrrverandi stjóri á Føroya Tele, kosin ársins leiðari 2007.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, Gloria Kalsø, handisskúlalærari, og Óli Olsen, blaðstjóri á Vinnuvitan, sótu í dómsnevndini. Í grundgevingini varð m.a. sagt, at Andras Róin miðvíst hevði ment ein stirvnan, almennan stovn til eina fyritøku, ið megnaði at koma inn í tann talgilda heimin. Andras Róin fekk tað skotsmál, at Føroya Tele við honum á odda hevur víst seg at havt altjóða ambitiónir og møguleikar. Harafturat varð fyritøkan søgd at hava eina opna leiðslu, har fólk ynskja at starvast – og vísa seg at støðast.

Andras Róin fekk eisini tey rósandi orðini, at hann var ímyndin av leiðslu og hevði stýrt eini fyritøku, ið vann pening.

Herfyri kundi Føroya Tele gjalda 30 milliónir í vinningsbýti.

Tá Andras Róin kom upp á pallin at taka ímóti herðaklappinum, segði hann seg vera ovfarnan.

- Eg havi havi ongantíð fingið so nógv rós, síðani eg segði upp, helt hann skemtiliga fyri.

Andras Róin segði, at hann ognaði starvsfólkunum á Føroya Tele heiðurin.



# Góða gongdin heldur fram

**Kaupthing Bank heldur kósina frá undanfarnum árum**

BANKI
*Eirikur Lindenskov*

Í morgun legði Kaupthing samtakið fram enn eitt sera gott útslit. Úrslitið hjá Kaupthing Bank fyri 2006 gjørdist 7,2 milliardir danskar krónur eftir skatt. Tað er ein vøkstur í úrslitinum áljóðandi 73% samanborið við rokskaparárið 2005. Úrslitið fyri 2006 svarar til eina renting av eginpeninginum á 42,4%.

- Við ársenda 2006 hevði Kaupthing Bank ein javna á 320 milliardir danskar krónur. Eginpeningur felagsins var 27 milliardir danskar krónur.

- Kaupthing Bank hevði eitt framúrskarandi úrslit í 2006. Talan er um enn eitt metár fyri felagið. Flestu av dótturfeløgunum í teimum 10 londunum, Kaupthing virkar í, høvdu metúrslit, og tað er gleðiligt at síggja, at inntøkugrundarlag okkara bara gerst sterkari og sterkari. Vit rokna við, at okkara vakstrarætlan áhaldandi fer at geva kundum okkara nýggjar møguleikar, sigur Hreiðar Már Sigurðsson, stjóri í Kaupthing samtakinum, í sambandi við ársroknskapin.

**Kaupthing Bank í Føroyum**

Sum partur av samtakinum hevði Kaupthing Bank í Føroyum somuleiðis eitt gott úrslit fyri farna árið. Roknskapurin fyri 2006, sum samstundis var tann seinasti fyri Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/f, vísti eitt yvirskot á 12,5 milliónir krónur. Tað svarar til eina renting av eginpeninginum á 41,1%. Úrslitið er betri enn úrslitið fyri 2005.

- Men tað eru nýggjar tíðir fyri felagið í Føroyum, staðfestir Peter Holm, stjóri í Kaupthing Bank í Føroyum.

- Hetta er síðsti ársroknskapurin hjá Kaupthing Virðisbrævameklarafelag. Vit reka nú bankavirksemi og kunnu bjóða kundum okkara eina munandi meira fullfiggjaða tænastu. Komandi árið verður spennandi fyri Kaupthing Bank í Føroyum, sigur hann.

Raksturin hjá felagnum í 2006 hevur verið nógv merktur av, at arbeitt hevur verið við at fáa eitt bankaloyvi í Føroyum. Nógv orka og nógvur peningur er brúktur til at fáa bankaloyvi til vega.